# Bilurin fillaður sundur

**RÚSEVNISMÁL** Litaviski bilurin, sum kom til Føroya í november í fjør við nógvum fjaldum rúsevnum í, varð allur tikin sundur, tá ið politiið og tollarnir leitaðu eftir fleiri rúsevnum

Randi Jacobsen

Í nevningatinginum mikudagin greiddu fleiri vitni frá rannsakananini av bilinum, sum teir báðir ákærdu litavarnir komu í land í Føroyum við 9. november í fjør.

Tollararnir høvdu illgruna um, at rúsevni vóru í bilinum, men í fyrsta umfari funnu teir einki, og narkohundurin Fido gjørdi heldur ikki veruliga vart við seg.

Menninir fingu tí bilin útflýggjaðan, men politiið helt eyga við bæði monnum og bili, og 13. november slerdi politiið til.




*Bilurin varð fullkomiliga tikin sundur. Akkumulatorurin sæst í høgra borði við bláum loki*

### Søgdu einki

Teir høvdu fingið innivist í Hotel Skansanum, og tá ið politiið kom og handtók teir og skuldsetti teir fyri at hava smuglað rúsevni, søgdu teir einki. Teir settu ikki so frægt sum ein spurning, greiddi ein politistur frá í rættinum.

Meðan politiið rannsakaði kamarið á Skansanum, var annar litavin hjá, tí hann dugdi enskt.

Hin maðurin varð beinanvegin fluttur i varðhaldið.

Og so varð farið at kanna bilin nærri, tí bæði tollvaldið og politiið vóru sannførd um, at rúsevni vóru onkrastaðni i bilinum.

Av tí at hugsanin var, at bilurin helst skuldi setast saman aftur, vórðu boð sett eftir bilkønum fólkum at vera við, soleiðis at alt kundi setast rætt saman aftur.

### Her var okkurt

Fyrsta stigið var at taka leidningarnar úr akkumulatorinum. Tá varnaðist onkur, at ljós framvegis var í bilinum. Her ruggaði ikki alt rætt.

Teir royndu síðan at seta bilin í gongd, og væl bar til.

Frammi í motorrúminum sat nevniliga eitt minni battarí, sum gav bilinum streym.

Politiið tók so akkumulatorin, sum var í viðførisrúminum úr fyri at røntgenfotografera hann.

Bilmekanikarin segði, at arbeiðið við forbindingum í bilinum sá út til at vera ógvuliga prosessionelt gjørt.

Hann hevði eisini varnast, at akkumulaturin var ov lættur. Teir fingu hendur á einum akkumulatori av sama slag. Tann vigaði 24 kilo, hin bara 15 kilo.

Allur bilurin varð systematiskt pilkaður sundur. Hvør skrúva tikin úr.

Bilurin varð so nógv pilkaður sundur, at hann ikki verður til bil aftur.

Elssløkkjarin og gassfløskan vórðu eisini skildar sundur.

Aðrastaðni í bilinum vórðu ikki fleiri rúsevni at finna, men teir funnu ymsar pappírslepar við adressum og telefonnummarum á.

Politiið fór síðan at kanna akkumulatorin nærri. Tá ið tey sóu okkurt hvítt í honum, varð hann tikin í serliga rúmið, sum politiið hevur til slíkar kanningar.

Í handskum og maskum fóru politistarnir til verka, og funnin vórðu ein rúgva av ecstasy-tablettum og plátur við tí sterka evninum methamfetamin. Vanliga innihaldið í akkumulatorinum varð tikið út, og rúsevni koyrd í kassan.

*randi@sosialurin.fo*

# Vitnar móti landsmonnunum

**RÚSEVNISMÁL** Litavin, sum kom til Føroya við Norrønu í gjár fylgdur av politistum, skuldi i dag vitna ímóti teimum báðum ákærdu í Føroyum í sonevnda BMW-málinum

Randi Jacobsen

Tá ið Norrøna í gjár kom úr Íslandi, vóru millum ferðafólkini ein litavi í fylgi við tveimum politistum.

Hesin litavin varð handtikin í Íslandi í januar, og hann varð ákærdur fyri at vera høvuðsmaðurin í sonevnda BMW-málinum. Tað er málið, sum eitt nevningating í hesum døgum viðger móti tveimum litavum, sum tiknir vórðu í Føroyum í november. Í bili teirra varð funnin ein stór nøgd av sterkum rúsevnum.

Hesin maðurin og tveir aðrir litavar vórðu ákærdir í Íslandi. Rætturin er liðugur við at viðgera mál teirra, men dómarnir eru ikki feldir enn.

### Vildi ikki til Føroya

Ákæruvaldið í Føroyum kravdi at fáa mannin til Føroya at vitna, men tí setti maðurin seg ímóti. Sambært íslendskum bløðum vildi hann ikki til Føroya, tí hann var bangin fyri at verða drigin fyri rættin her og fáa harðari revsing, enn hann kann vænta sær at fáa í Íslandi. Revsingin í Føroyum er nevniliga harðari í rúsevnismálum enn í fleiri øðrum londum.

Maðurin skal tó bara vitna í Føroyum.

Rætturin í Íslandi gjørdi úrskurð um, at maðurin skuldi til Føroya at vitna. Hann kærdi henda úrskurð, men hægsti rættur staðfesti úrskurðin, hóast ein av dómarunum var ímóti tí.

Tveir politistar í Føroyum fóru til Íslands eftir manninum, og teir komu til Føroya við Norrønu í gjár. Politiið valdi ta tryggu loysnina at flyta mannin sjóvegis til Føroya, um tað skuldi hent, at luftrúmið aftur verður stongt vegna øsku.

Tað gekk ógvuliga stillisliga fyri seg, tá ið maðurin kom í land. Ein sivilklæddur politistur tók ímóti tí ákærda litavanum og teimum báðum sivilklæddu fylgjarum hansara. Teir settu seg inn í ein bil og koyrdu beina leið til varðhaldið.

*randi@sosialurin.fo*



*Tá ið politistarnir komu í land í gjár við litavanum, fóru teir beint í bilin, sum stóð fyri teimum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*